

# Speditørur til fraktdeildina

Vegna økt virksemi er eitt spennandi starv leyst at søkja á fraktdeildini. Sum speditørur skalt tú leggja til rættis og tryggja, at vørur koma úr einum staði í annað. Hetta inniber m.a. tryggingar og tolling av vøruflutningi. Starvið er víðfevnt og tær dámar væl at arbeiða við sølu. Tú kennir væl til flutnings- og tollviðurskifti í norðanlondum. Tær dámar væl at arbeiða nógv og skjótt, og at taka skjótar avgerðir, sum kunnu hava fíggjarligar og løgfrøðiligar avleiðingar. Tú samskiftir nógv við kundar og tingast vegna kundar við fyritøkur uttanlands, fyri at fáa tey bestu tilboðini. Tú skalt starvast í einum toymi, sum serliga hevur ábyrgd av flogfraktini.

**Fakligir førleikar**

- Tú hevur útbúgving ella royndir innan spedition
- Tú dugir væl føroyskt og danskt í skrift og talu
- Tú hevur teldukunnleika á brúkarastøði
- Tú hevur kunnleika til logistikk

**Persónligir førleikar**

- Tú dugir væl at samskifta.
- At selja og tosa við kundar er natúrligt fyri teg
- Tú ert jalig/-ur og opin
- Tú ert ágrýtin og fleksibul
- Tú kannst arbeiða við nógvum uppgávum í senn

**Tú kannst vænta**

- Møguleika fyri menning
- Gott og framtakshugað umhvørvi
- At tín ávirkan ger stóran mun á heildina

**Løn og setanarviðurskifti**

Starvið er lønt eftir sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið. Talan er um fulltíðarstarv, sum er 39 tímar um vikuna. Setanardagur er skjótast tilber.

**Umsókn**

Umsókn skal sendast til:
P/F Postverk Føroya, starvsfólkadeildin
Óðinshædd 2
100 Tórshavn

og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi **16. mai 2008**.

**Spurningar**

Spurningar um starvið sum speditørur á fraktdeildini kunnu setast Jan Arabo, leiðara, telefon 346052 ella Marry Poulsen, starvsfólkaleiðara, telefon 236092.

Stutt um Postverk Føroya
245 fólk starvast hjá P/F Postverki Føroya. Hin 1. januar 2005 varð postverkið umskipað frá almennum stovni til partafelag við Føroya Landsstýri sum eigara. Høvuðsskrivstovan, miðdepilin fyri alt virksemi felagsins, er á Óðinshædd í Tórshavn. Saman við samstarvsfelagum veitir Postverk Føroya bestu flutningstænastu og dygdarbestu viðgerð úti og heima.

Postverk Føroya
– okkara samskiftisfyritøka

**postverk.fo**

Trivnaðartænastan

## Tvey hús ynskjast til leigu

**Eini hús ynskjast til leigu í Eysturoy ella í Norðoyggjum.**

Húsini skulu vera í góðum standi og hava pláss fyri sjey búfólkum, umframt einum starvsfólkarúmi.

**Eini hús ynskjast til leigu í Vágunum ella Norðurstreymoy**

Húsini skulu vera í góðum standi og hava pláss fyri seks búfólkum, umframt einum starvsfólkarúmi.

Meira fæst at vita um leigumálið við at venda sær til Hermann Mortensen, virkandi leiðara fyri Trivnaðartænastuni, á tlf. 36 00 00 ella á teldupost til hermannm@naerverk.fo

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

# BRÚKIÐ MIÐLAHÚSIÐ



**Ring og hoyr nærri**

miðlahúsið
í Vágsbotni

· Konsertir
· Fundir
· Framsýningar
og annað

FØROYABANKI
stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum

TÓRSGØTA 1 · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW. SOSIALURIN.FO
Sosialurin

**22 50 00**

TÍÐINDAVAKTIN
ALT VIKUSKIFTIÐ



VIVA